## Kasparov mótmælti

Garri Kasparov, ið verður roknaður sumn heimsins besti telvari, var sunnudagin uppi í einari mótmælisgongu, sum mótmælti rættarmálinum ímóti oljuríkmanninum Mikhail Khodorkovskij.

Løgreglan legði upp í mótmælisgonguna, og fleiri fólk vórðu tikin. Sambært fjølmiðlunum royndi løgreglan eisini at taka Kasparov, men tað eydnaðist lívverjum hansara at forða tí. Ta seinastu tíðina hevur Kasparov gjørt seg galdandi á tí politiska pallinum í Russlandi, og hann er nú oddamaður í einum felagsskapi, hvørs endamál er at forða fyri, at Vladimir Putin og menn hansara sleppa at halda fram í stjórn aftan á valið í 2008.

Mikhail Khodorkovskij varð mánadagin funnin sekur í umfatandi skattasviki, og hann kann fáa upp í tíggju ára fongsul. Eygleiðarar í Moskva vænta kortini ikki, at revsingin verður so hørð, tí nógvir russar eru av teirri áskoðan, at málið ímóti honum er meiri politiskt enn løgfrøðiligt. Tí kann ein hørð revsing fáa mong at seta seg upp ímóti myndugleikunum, siga eygleiðararnir.

## Svøltar seg

Danski ríkisborgarin Omae Maarouf, sum situr fangi í einum fongsli í Marokko, er farin at svølta seg saman við 1.500 øðrum fangum. Sambært Politiken fóru fangarnir at svølta seg fyri fjúrtan døgum síðani, og ein teirra doyði í síðstu viku.

Omar Maarouf varð tikin í Marokko fyri tveimum árum síðani, og stutt eftir bleiv hann dømdur til deyða fyri at hava verið við til at leggja fleiri morðætlanir til rættis. Myndugleikarnir í Marokko søgdu, at hann hevði játtað seg sekan, men sjálvur hevur Omar Maarouf sagt, at hann bleiv tvungin til at játta seg sekan.

Tann 39 ára gamli Omar Maarouf hevur búð í Danmark í 17 ár, og hann hevur vrið danskur ríkisborgari síðani 1998. Kona hansara og fýra børn búgva framvegis í Danmark.

## Funnin sek

Ein hernaðardómstólur í Texas hevur dømt ta 27 ára gomlu Sabrinu Harman seka í at hava gjørt seg inn á fangar í Abu Ghraib-fongslinum í Irak.

Sabrina Harman var ákærd fyri seks lógarbrot. Hon var ákærd fyri at hava farið illa við fangum og fyri at hava eyðmíkt fleiri teirra kynsliga. Harumframt var hon ákærd fyri samansvørjing og fyri at hava vanrøkt sínar skyldur sum amerikanskur hermaður.

Sabrina Harman var ein av teimum amerikonsku hermonnunum, sum gjørdust kendir um allan heimin av myndunum úr Abu Ghraib-fongslinum. Á einari av myndunum stóð hon undir liðini á einum dunga av naknum irakskum fangum. Seks aðrir hermenn hava játtað seg sekar, og Charles Graner, ið verður roknaður sum høvuðsmaðurin aftan fyri ágangin ímóti fangunum, hevur fingið tíggju ára fongsul.

Sabrina Harman er ikki tann einasta kvinnan, sum er ákærd fyri ágang ímóti fangunum í Abu Ghraib. Ein onnur, Lynndie England, hevur verið í rættinum, men málið skal takast uppaftur, tí frágreiðingar hennara og frágreiðingarnar hjá nøkrum vitnum samsvaraðu ikki, skrivar AP.

## Afrikanskar kvinnur bíligari

Tey seinnu árini hava tey donsku skøkjuhúasini serliga brúkt kvinnur úr teimum eysturevropeisku londunum og úr Fjareystri, men soleiðis er ikki longur.

Ekstrablaðið og TV2 hava kannað viðurskiftini, og teirra niðurstøða er, at skøkjuhúsini brúka nú fleiri kvinnur úr teimum vesturafrikonsku londunum. Kvinnurnar verða smuglaðar úr Vesturafrika til Italia, har smuglararnir hava eina miðstøð, og haðani verða tær so sendar til skøkjuhús ymsastaðni í Vesturevropa, sigur Troels Ørting Jørgensen hjá donsku ríkisløgregluni.

Tað er ikki eftirspurningurin eftir myrkum kvinnum, sum ger, at alt fleiri kvinnur úr Vesturafrika koma til tey donsku skøkjuhúsini, men orsøkin er tann einfalda, at tær eru bíligari, og at nóg mikið er til av teimum, sigur løgreglumaðurin. Tað ger, at tey, sum reka skøkjuhúsini, kunnu fáa so mikið meiri burturúr, sigur hann.

## UTTAN ÚR HEIMI



*Soleiðis sá út í Punta Gorda í Florida aftan á ódnina Charley, sum herjaði har tann 14. august í fjør*

*Mynd: Reuters*

# Vænta nógvar ódnir í ár

**Amerikanskir veðurmenn vænta, at nógvar ódnir fara at herja leiðirnar við Karibiska Havið í ár.**

VEÐURFORSØGN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í Karibiska Havinum verður tíðarskeiðið frá 1. juni til 30. november roknað sum tíðin, tá tropiskir stormar og tropiskar ódnir gera um seg. Í meðal er níggju tropiskir stormar í økinum á hvørjum ári, og seks teirra enda sum tropiskar ódnir.

Men í ár verður helst verri, siga amerikanskir veðurmenn. National Oceanic and Athmospheric Administration sigur, at tey vænta ímillum 12 og 15 tropiskar stormar uttan úr Atlantshavinum í ár. Átta teirra fara væntandi at versna so nógv, at teir verða til tropiskar ódnir, og ímillum tríggjar og fimm teirra verða væntandi rættiliga ringar.

Árið í fjør var eitt av teimum ringastu, og tá vóru ikki færri enn 15 tropiskir stormar, sum raktu Haiti, Grenada, Jamaica, Cayman Oyggjarnar og Florida, og bara í USA kravdi illveðrið 209 mannalív. Fýra av teimum tropisku stormunum versnaðu til tropiskar ódnir, sum gjørdu skaða fyri umleið 45 milliardir dollarar í USA. Skaðin aðrastaðni var eisini stórur.

Serliga ódnin Ivan gjørdi stóran skaða í fjør. Hon oyðilegði fleiri olju- og gasspallar í Meksikanska Flógvanum umframt fleiri leiðingar, og tað hevði við sær, at teir næstu seks mánaðarnar var oljuframleiðslan 45 milliónir tunnur minni enn vanligt, skrivar Reuters.

# Eingin vil vera á Ground Zero

**Fleiri skrivstovubygningar standa í gerð á økinum, har World Trade Center stóð, men eingin vil leiga hølini. ST umhugsar at flyta hagar**



*Eingin vil vera á Ground Zero, har World Trade Center stóð*

*Mynd: Reuters*

ENDURBYGGING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Silverstein Properties hevur ikki fingið nógvar fyrispurningar, síðani fyritøkan lýsti við skrivstovuhølum, sum eru til leigu í teimum nýggju bygningunum, sum standa í gerð á Ground Zero í New York. Ætlandi sleppa teir fyrstu leigararnir inn í hølini næsta ár, men enn er tað bara útleigufyritøkan sjálv, sum hevur skrivað undir sáttmála um at leiga høli har, skrivar Financial Times.

Tann lítli áhugin fyri teimum nýggju skrivstovuhølunum hevur nú fingið ST at vísa bygningunum áhuga. Ein talsmaður hjá heimsfelagsskapinum vátar fyri Financial Times, at felagsskapurin hevur brúk fyri fleiri hølum, tí tann gamli ST-bygningurin skal umvælast. Tað arbeiðið er mett at taka eini sjey ár, og tí er tað ikki óhugsandi, at ST fer at húsast á Ground Zero, meðan tann gamli bygningurin verður umvældur, skrivar blaðið.